


www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 12 - 2011

# DONG ger gassfund í Norra

Danska oljufelagið DONG hevur saman við fyristøðufelagnum ConocoPhillips funnijð gass í einum brunni í syðra partinum av Norðsjónum, í tí sokallaða Peking Duck økinum. Enn veit man ikki, hvussu stórt fundið er, men leitistjórin hjá Dong, Jan Terje Evaldsen fegnast um úrslitið av boringini. Nú verður farið at kanna tilfarið og vita, um tað er lønandi at taka gassið upp. Dong er longu týðandi luttakari í gassframleiðslu í norskum øki, eitt nú á leiðunum Ula, tambar, Alve, Trym og Ormen Lange. Haraftrat eru fundini Oselvar og Marulk í løtuni við at verða útbygd. Dong eigur 28% av nýggjasta fundinum.

